Vil sleppa í nevnd

Formaðurin í Ny Alliance, Naser Khader, harmast um, at flokkur hansara ikki er umboðaður í donsku-grønlendsku sjálvsstýrisnevndini. Khader, sum hevur verið í Grønlandi og í Føroyum, sigur við KNR, at Ny Alliance hevur stóran áhuga í viðurkiftunum í Grønlandi og ríkisfelagsskapinum. Flokkurin vil tí fegin gera sína ávirkan galdandi í sjálvsstýrisnevndini, eitt nú í spurningum um korini hjá børnunum í Grønlandi.

Ny Alliance vil sleppa í donsk-grønlendsku sjálvsstýrisnevndina (Savnsmynd)

Kvotur skulu kosta

Borgarstjórin í Tasiilaq, Vittus Mikaelsen, sum royndi seg á formansvalinum í Siumut-flokkinum í gjár, heldur, at allir grønlendingar eiga at fáa ágóða av fiskiríkidømunum. Við KNR sigur hann, at allir grønlendingar eiga fiskiríkidømið, og tí kundi tað verið eitt hugskot, at tey, sum hava kvoturnar, rinda10 oyru ella kanska eina krónu fyri hvørt kilo, sum tey avreiða. Pengarnir kundu millum annað farið til at lækka ferðakostnaðin, heldur hann.

Bíligari matur og lægri gjøld

Nú samráðingar eru um nýggja samgongu, fer Javnaðarflokkurin at krevja, at mvg verður verður lækkað av grønmeti og frukt og helst øðrum húsarhaldsvørum við. Samstundis skal sjúkrakassin avtakast og leggjast undir vanliga skattin

SAMGONGUSAMRÁÐINGAR
Áki Bertholdsen
aki@sosialurin.fo

- Tað gongur stilt og róligt.

Tað er skoðsmálið, sum Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna-og heilsumálum og nývaldur tingmaður, gevur samráðingunum um nýggja samgongu við Sambandsflokkin og Fólkaflokkin.

Vit hittu hann, beint áðrenn hann fór á samráðingarfund í morgun.

Tað hevur gingið strilti at fáa politikarar at siga nakað ítøkiligt um samráðingar og Hans Pauli Strøm er eisini rættiliga varin.

Lægri mvg

Hann staðfestir kortini, at Javnaðarflokkurin hevur sum eitt krav, at mvg og avgjøld á frukt og grønmeti skulu lækkast og helst avgjøldini á øðrum húsarhaldsvørum við.

Hans Pauli Strøm heldur eisini, at tað er neyðugt, at ein nýggj samgonga tekur spurningin um tann stóra prísvøksturin á húsarhaldsvørum, upp.

- Og at lækka mvg, kann undir ongum umstøðum standa einsamalt og tí er tað neyðugt, at vit eisini skipa eitt munagott príseftirlit, sum kann hava regluligar prískanningar.

Sjúkrakasssin avtakast

Hinvegin hevur Javnaðarflokkurin tað eisini sum eitt týðandi mál, at sjúkrakassin verður avtikin og lagdur undir vanliga skattin.

Harafturat er tað eitt ógvuliga týðandi mál fyri Javnaðarflokkin, at gjaldið til sjúkrakassan verður avtikin.

- Hetta verður eitt mál, sum kostar 90 milliónir og tað sigur eitt sindur um, hvussu dýrur Sjúkrakassin í veruleikanum er fyri vanlig fólk, sigur Hans Pauli Strøm.

Hinvegin staðfestir hann, at tað er avgjørt ikki semja um at avtaka gjaldið til sjúkrakassan.

- Tað er onkur í samráðingunum, sum heldur, at hetta er at økja um skattatrýstið og sum vil hava skattatrýstið soleiðis, at vanligi skatturin av inntøku skal lækka og vanligu brúkaragjøldini skulu hækka.

- Men hesum er Javnaðarflokkurin grundleggjandi ósamdur í, tí brúkaragjøldini venda sosialt skeivt við tað, at tær lægru inntøkurnar betala lutfalsliga meir, samstundis sum tey vælbjargaðu betala lutfalsliga minni.

- Tí heldur Javnaðarflokkurin, at brúkaragjøldini skulu minka og sum mest av skatti skal takast inn við vanligum skatti av inntøkum, tí tað er samhaldsfastari og vendir sosialt rættvísari.

Hinvegin stendur tað rimmarfast, at tað verður ongin nýggjur skattalætti latin í hesum valskeiðnum, útyvir teir skattalættin, sum longu er samtyktur fyri í ár.

Hóast samráðingarnar ganga stilt og róligt, metir Hans Pauli, at um hesi samgonguni er lív lagað, vil vísa seg, tá ið farið verður undir tað tyssi av málum, sum semja ikki er fingin um og endalig semja skal finnast um tey.

Hans Pauli Strøm, sigur, at tað gongur stilt og róligt og sjálvur vil hann hava lægri mvg á frukt og grønmeti, men hann vil eisini hava eitt munagott príseftirlit og at gjaldið til sjúkrakassan verður avtikið

Fínteljingin broytti einki

Bjarni Djurholm er við lutakasti vorðin fyrsti varamaður á fólkaflokslistanum. Heðin Zachariassen og Bjarni Djurholm fingu báðir 317 atkvøður – og fínteljingin broytti ikki hetta

LØGTINGSVAL
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Týsdagin 22. januar 2008 var løgtingsvalnevndin, saman við hjálparfólki, liðug við fínteljingina av atkvøðum eftir løgtingsvalið 19. januar 2008. Fínteljingin vísti bert smávegis broytingar, sum hvørki ávirka býtið av løgtingslimum millum flokkarnar ella hvørjir løgtingslimir eru valdir, samanborið við úrslitið valkvøldið.

Úrslitið gjørdist: Sí talvu

Hesi valevni eru vald á ting:

A. Fólkaflokkurin: Jacob Vestergaard (870), Jørgen Nicalsen (617), Annfinn Kallsberg (550), Annika Olsen (520), Jákup Mikkelsen (437), Jógvan á Lakjuni (417) og Poul Michelsen (341)

B. Sambandsflokkurin: Magni Laksáfoss (979), Kaj Leo Johannesen (642), Bjørn Kalsø (557), Edmund Joensen (469), Alfred Olsen (417), Johan Dahl (377) og Rósa Samuelsen (314).

C. Javnaðarflokkurin: Jóannes Eidesgaard (1.094), Gerhard Lognberg (595), Helena Dam á Neystabø (577), Hans Pauli Strøm (383), John Johannessen (287) og Katrin Dahl Jakobsen (283)

D. Sjálvstýrisflokkurin: Kári á Rógvi (572) og Kári P. Højgaard (292)

E. Tjóðveldi: Høgni Hoydal (1.262), Anita á Fríðriksmørk (616), Bjørt Samuelsen (547), Bergtóra Høgnadóttir Joensen (481), Sjúrður Skaale (416), Heini O. Heinesen (415), Tórbjørn Jacobsen (356) og Hergeir Nielsen (352)

H. Miðflokkurin: Karsten Hansen (808), Bill Justinussen (573) og Jenis av Rana (504)

Flokkur	Samlað atkvøðutal	Atvøður í prosentum	Tal á løgtingslimum
A. Fólkaflokkurin	6.240	20,1	7
B. Sambandsflokkurin	6.529	21,0	7
C. Javnaðarflokkurin	6.018	19,3	6
D. Sjálvstýrisflokkurin	2.244	7,2	2
E. Tjóðveldi	7.250	23,3	8
H. Miðflokkurin	2.610	8,4	3
L. Miðnámsflokkurin	221	0,7	0
Tilsamans	**31.112**	**100**	**33**

Fínteljingin broytti onki í atkvøðutalinum hjá Bjarna Djurholm og Heðini Zachariassen, sum eru nr. 8 og 9 á lista A við sama atkvøðutali 317. Nevndin gjørdi tí av 22. januar 2008 at kasta lut millum teir báðar, meðan hjálparfólkini vóru hjástødd. Úrslitið varð, at Bjarni Djurholm er fyrst valdi og Heðin Zachariassen næst valdi varalimur á lista A.

– Úrslitið av fínteljingini av løgtingsvalinum 19. januar 2008 er at finna á heimasíðuni hjá Kringvarpi Føroya, www.kringvarp.fo, sigur Leivur Harryson, formaður í valnevndini.